# Farloyvisstarv sum tekniskur leiðari

## Starvið

Eitt farloyvisstarv sum tekniskur leiðari fram til 1. november 2020 er leyst at søkja.

Sunda kommuna fevnir um 11 bygdir í Eysturoynni og Streymoynni og fólkatalið er tilsamans 1.800. Sum tekniskur leiðari fært tú eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú sum leiðari fært týðandi leiklut í framhaldandi menningini av kommununi.

Tekniski leiðarin hevur tilvísing til borgarstjóran. Kommunuskrivstovan er á Oyrarbakka og í kommunufyrisitingini starvast 10 fólk. Tekniska økið er skipað við tekniskum leiðara, málsviðgera og tveimum eindum við umsjónarmonnum, ávikavist veitingareind og ognareind.

## Høvuðsuppgávur

- Daglig leiðsla á teknisku deild
- Fíggjarlig ábyrgd av tekniska økinum
- Projekteringsarbeiði og eftirlit
- Býar- og byggiplanlegging
- Málsviðgerð og ráðleggingararbeiði
- Stýring av kommunalum byggi- og viðlíkahaldsarbeiði
- Ábyrgd av øllum bygningum og undirstøðukervi hjá kommununi
- Skrivari hjá teknisku nevnd
- Ráðgeving av leiðslu og býráðslimum í tekniskum málum

## Førleikakrøv

Umsøkjarar verða mettir eftir fakligum, leiðsluligum og persónligum førleikum. Umsøkjarar eiga at hava:

- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni ella annað viðkomandi útbúgvingarstøði saman við royndum
- Góðan kunnleika til leiðslu og fíggjarstýring
- Góð samstarvsevni
- Hollan telduførleika
- Evni at raðfesta, arbeiða undir trýsti og at hava nógv virksemi í gongd í senn.

## Fyrimunir

- Førleika í projekteringsarbeiði
- Kunnleika til 360 journalskipan
- Kunnleika til Navision
- Kunnleika til ArcGIS
- Kommunalt innlit
- Leiðsluroyndir
- Opin og fyrikomandi
- Royndir innan omanfyri lýstu høvuðsuppgávur

Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Starvið verður lønt sambært galdandi sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda tær til borgarstjóran á telefon 66 72 72.

Skrivlig umsókn, saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skal vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagið 16. september 2019. Umsóknirnar verða viðgjørdar í trúnaði.

Um ikki nóg nógvir skikkaðir umsøkjarar eru, skilar kommunan sær rætt til ongan at seta.

Sunda kommuna · Oyrarbakkavegur 3 · Postrúm 10 · FO-400 Oyrarbakki · Tel. 66 72 71 · sunda@sunda.fo